**Skála fekk loksins teir so væl kendu marginalarnar í sín part, og nú liggja teir av álvara í bakhjólinum undan seinasta umfarinum í Formula-deildini**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*



*Jónhard Fredriksberg fylgir spentur við, meðan Iulian og Ronnie stríðast um bóltin. Tað sama mundu mongu áskoðararnir av Skála eisini gerast, men tíggju minuttir fyri leiklok kundu hesi loksins aftur fegnast um ein sigur*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

EB/Streymur-Skála 0-1 (0-0):

# So koppaði rætta vegin

Tað líktist eini endurtøku av seinasta dystinum í fjør, tá Skála sunnudagin fór av Eiði við einum 1-0 sigri í viðførinum. Ta ferðina tóktust teir hjá Skála at hava mist luftina í stríðnum um heiðursmerki og europeiskan fótbólt, men við einum 1-0 sigri megnaðu teir kortini at halda sær á bronsuplássinum.

Hesa ferð var tað tó gullið, sum stóð upp á spæl. Eftir fýra dystir uttan sigur, stóð nú nógv á hjá Skála, og í veruleikanum var talan um allar seinasta útkall, skuldu teir framvegis vera partur av oddastríðnum.

Og eftir 80 minuttum var Skála at kalla úti úr stríðnum. Bæði B36 og HB høvdu kós móti sigri í ávíkavist Gøtu og Havn, og varð talan um málleysan javnleik á Eiði, so kundi Skála í mesta lagi gera sær vónir um silvurmerkini. Men Nenad Stankovic vildi tað øðrvísi.

Maðurin, sum av mongum verður mettur sum favorittur til heitið sum ársins spælari, hevur kanska ikki skotið so nógv mál. Men afturfyri, so hevur talan verið um týðandi spørk. Soleiðis var tað hann, sum við einum máli í Havn vissaði Skála sigurin, tá teir á útivølli bastu HB, og aftur hesa ferð var hann bjargingin. Hesa ferð var uppskriftin hornaspark, sum Iulian Florescu sendi væl innfyri, og tá eingin heimamaður fekk sparkað burtur, var Nenad rætti maðurin á rætta staðnum.

### Linligur dystur

Talan var annars um ein dyst av teimum heldur linligu á Eiði sunnudagin. Báðir partar høvdu stóra virðing fyri hvørjum øðrum, og fyri tað nógva ráddi um at halda seg frá óneyðugum mistøkum, sum kundu bera tap við sær.

Gestirnir høvdu ikki óvæntað lagt seg eftir at ansa Sorin Anghel sera væl, og tann setningin greiddi Pætur Dam Jacobsen til fulnar. EB/Streymur hevði tó einstakar møguleikar, men teir megnaðu ikki at gera sær dælt av hesum.

Skála dúvaði hinvegin upp á eyðkendu kviku kontra-álopini. Teir lógu rættiliga djúpt á vøllinum, men tá teir so fóru frameftir, gekk tað aftur fyri skjótt fyri seg. Bogi Gregersen var eisini heilt nær við ta einu ferðina, men skotið fór framvið málinum, og so líktist tað søguni, sum hon so ofta hevur verið hjá Skála seinasta mánaðin.

Men tann søgan broyttist altso, tá Nenad slapp framat. Og úrslitið hevur við sær, at Skála nú av álvara hevur lagt seg í bakhjólið undan seinasta umfarinum. Sum góðir súkklarar kunnu teir nú strúka fram við bæði B36 og HB beint undan sjálvari málstrikuni, men tað krevur so eisini, at úrslitini laga seg. Fyrst og fremst er treytin, at Skála ger sítt, tá GÍ kemur á vitjan. Og í øðrum lagi er treytin, at teir báðir grannarnir í Havn fyri triðu ferð í ár spæla javnleik. Kanska ikki eitt heilt ósannlíkt úrslit, menn hinvegin eitt úrslit, sum teir hjá Skála ikki eru harrar fyri sjálvir. Í so máta munnu teir í dag iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at fáa betri úrtøku móti TB, NSÍ, HB ella KÍ seinastu fýra dystirnar.

## Fakta um dystin

**EB/Streymur-Skála 0-1 (0-0)**

**0-1:** Nenad Stankovic, 80.

**Dómari:** Georg N. Rasmussen

**EB/Streymur:** René Tórgarð - Esmar Eiðisgarð (Hans Pauli Samuelsen, 85.), Marni Djurhuus, Egil á Bø, Jóhan á Stongum - Bárður Olsen, Ronnie Samuelsen, Gert Hansen, Jákup Martin Joensen (Teitur Joensen, 72.) - Sorin Anghel, Sonni L. Petersen (Leif Niclasen, 69.)

**GK:** Ronnie Samuelsen, Sorin Anghel, Bárður Olsen, Jóhan á Stongum, Marni Djurhuus

**Skála:** Eugen Voda - Pætur Dam Jacobsen (Volmar Poulsen, 83.), Milic Curcic, Rúni Rasmussen, Iulian Florescu - Rói Jacobsen, Pauli G. Hansen, Nenad Stankovic, Hanus Thorleifsson - Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen (Teitur Joensen, 90.).

**GK:** Rúni Rasmussen, Pauli G. Hansen

# Nyttar einki at iðra seg

**Á Skála ásanna tey, at tað ikki longur er upp til teir at gera av, hvørt talan verður um gull ella ikki. Men teir staðfesta, at tað nyttar einki at iðra seg um tað, sum er farið**

FÓTBÓLTSPRÁT

*Jákup Mørk*

- Hatta var øgiliga deiligt. Vit hava ikki havt tað alt ov lætt seinastu vikurnar, og serliga var tapið á Sevmýri herskin biti hjá okkum. So tú kanst ætla, at vit vóru glaðir

Soleiðis segði Bogi Gregersen, tá vit fingu orðið á hann, eftir at Skála sunnudagin vann lykladystin á Eiði, og soleiðis framvegis er partur av gullstríðnum.

Teir so væl kendu marginalarnir hava annars ikki verið við Skála seinastu tíðina, men hesa ferð helt Bogi, at úrslitið kundi koppað báðar vegir.

- Tað var kanska eisini tað, sum gjørdi tað so stuttligt fyri okkara viðkomandi. Vit hava spælt hópin av jøvnum dystum seinastu tíðina, men hesa ferð koppaði tað so til okkara fyrimun.

Og nú hava tit framvegis møguleikan fyri gullinum. Er tað nakað, sum tit hugsa um?

- Ikki so øgiliga nógv. Fyrst og fremst, so ræður um hjá okkum at vinna seinasta dystin. Undan hesum dystinum settu vit okkum fyri, at fingu vit seks stig í teimum báðum seinastu dystunum, so fingu vit í minsta lagi silvur. Sjálvandi kann tað framvegis gerast talan um gull, men tað er so ikki nakað, sum vit gera av. Og í øllum førum er silvur eitt betri, enn vit fingu í fjør.

Men iðra tit tykkum ikki eitt sindur um mongu stigamissirnar seinastu tíðina?

- Sjálvandi hava vit mist fleiri heldur óneyðug stig. Men tað hjálpir bara einki at hugsa um tað. Tú skalt eisini hugsa um, at bæði B36 og HB eisini hava mist tað, sum tey helst halda vera óneyðug stig, so í so máta standa vit líka. Og vunnu vit ikki á Eiði, so kundu vit kanska enda á fimta plássinum, so tað er fyrst og fremst tað, sum vit nú fegnast um.

Og hetta er væl undir øllum umstøðum meira hugaligt, enn talan var um fyrstu árini í bestu deildini.

- Sjálvandi. Ikki tí, tá var tað eisini stuttligt, tí vit ár um ár bjargaðu okkum við einum ótrúligum endaspurti. Men hetta er nakað heilt annað. Nú stríðast vit fyri at halda okkum í oddinum, og tað er alt annað líka nakað væl hugaligari, staðfesti ein væl nøgdur Bogi Gregersen at enda.